Kendur bretskur útvarpsmaður ger sendingar um Føroyar:

Bretar skulu nú hoyra hvat føroyingar halda um marknatrætuna

Nógvir bretar vita ikki hvat og hvar Føroyar eru. Enn minni vita teir nakað um marknatrætuna millum Føroyar og Bretland. Hetta ætlar BBC-journalisturin Roger Hearing at gera nakað við. Í einum av best umtøktu sendingunum í bretska útvarpinum fáa fleiri føroyingar við løgmanni á odda høvi at siga sína hjartan hugsan um Bretland og aktuellu marknatrætuna.

Roger Hearing vitjar í blaðhúsinum hjá Sosialinum á Argjum, har hann setti blaðstjóranum spurningar serstakliga um marknatrætuna

JAN MULLER

Hetta er tíðin, tá útlendskir journalistar plaga at vitja Føroyar. Hetta árið er so heldur einki undantak í so máta. Herfyri var eitt stórt lið av donskum ferðavinnujournalistum á vitjan. Ein týsk sjónvarpsstøð hevur sent eitt lið til at gera sending um Føroyar, og í hesum døgum vitjar eisini journalistur frá svenska blaðnum Expressen.

Tað, sum dreg ir, er bæði føroyska náttúran, tað er búskaparliga kreppan, tað er oljan og ikki minst filmurin um Barabaru, sum tykist at kunna gerast besta PR fyri Føroyar nakrantíð í søguni.

BBC-maður her

Umframt hesi tíðindafólkini er so eisini ein av kendu journalistunum hjá BBC í Bretlandi. Hann eitur Roger Hearing og starvast í dag við BBC Radio. Áður hevur hann arbeitt hjá bretska sjónvarpinum og var í 3 ár teirra maður í Afrika.

Nú hevur hann so lagt leiðina til Føroya, og tað, sum serstakliga hevur fingið hann at vísa Føroyum ans eru søgurnar um, at føroyingar eru hugaðir fyri at fáa altjóða bankaverðina at seta seg niður í Føroyum og harvið kunna troyta fyrimunir av, at Føroyar eru ikki limir av ES.

-Nú hava vit í bretska ríkinum havt seravtalur fyri bæði Man og Gurnsey, sum hava megnað at fáa altjóða bankaverðina at seta seg niður har. Áhugavert kann vera at siggja, um Føroyar hugsa tað sama og hvussu hetta fer at roynast fyri eitt grannaland, sum ikki er partur av ES.

Hetta er so bert ein partur av tí, sum Roger Hearing ynskir at hoyra nakað um , hann ynskir sjálvandi eisini at fáa nakað at vita um kreppuna og trupulleikarnar, sum gjørdust so álvarsligir fyrst í 90-unum og hvussu føroyingar hava roynt at bast hesum trupulleikum.

Marknatrætan eisini við

Roger Hearing ætlar sær eisini at viðgera marknatrætuna millum Føroyar og Bretland í sendingini. Hann sigur, at tá hann gjørdi forkanningar sínar, kom hann eftir, at her var eitt mál, sum føroyingar góvu serstakan gætur, og tað var marknatrætan við bretar.

-Eg haldi hetta kundi verið áhugavert at tikið við, ikki minst tí, at nógvir bretar als einki vita um Føroyar ella hvar Føroyar liggja og tíansheldur vita nakað um, at tað er finst ein marknaósemja við Bretland.

Eg haldi tað er rætt at geva føroyingum møguleika at siga sína hugsan um hetta málið og sjálvandi eisini at gera støðuna upp frá bretskari síðu.

-Merkir tað, at bretskir politikarar her fara at fáa høvi til at hoyra, hvat føroyingar meina?

-Eg fari at gera mítt besta fyri at kunna fáa fram meiningarnar hjá føroyingum um hetta málið, og tað er so neyvan nakað, sum bretar hava møguleika at hoyra ofta.

Roger Hearing heldur fyri, at um ikki Tony Blair hevur møguleika at lurta, so fara hansara ráðgevar helst at gera tað.

Eingin ivi er um, at sendingin ella sendingarnar hjá Roger Hearing í BBC fara at vekja ans, tí hetta er bæði eitt forvitnisligt evni og senditíðin er eisini ein tann besta.

Talan er um sendingina „To Day" sum er eitt so-kallað „Morning breakfast Show", ið verður mett sum ein av teimum mest seriøsu sendingunum yvirhøvur. Tað eru serliga politikarar, vinnulívsfólk og annars tey, sum eru við til at skapa meiningarnar, ið lurta eftir hesi sendingini.

Roger Hearing er vísir í, at hetta er ikki seinastu ferð at hann vitjar Føroyar. -Land tykkara er ótrúliga vakurt við tí skiftandi veðurlagnum. Landið sýnist at vera væl umgingið og stýrt og fólk sýnast eisini at hava stóran áhuga fyri at varðveita og verja umhvørvið.

Húsini

Rasmusargøta 9 (Hornabø) eru til sølu.
um hóskandi boð fæst.

Tlf. 10963 - 18023

Sølufólk søkist
til Tíðindablaðið Sosialin

Vit sóknast eftir einum sølufólki til at taka sær av tí dagliga arbeiðinum við sølu og lýsingum.

Tú:
ert ágrýtin og álítandi,
dugir og dámar væl at tosa í telefon,
hevur lætt við at tosa við fólk,
hevur áhuga fyri telduarbeiði,
ert før/ur fyri at arbeiða undir tíðartrýsti,
hevur hugflog og dugir at festa tað
á pappír
og kanst byrja skjótast gjørligt.

Vit kunnu bjóða:
eitt spennandi og mennandi starv,
gott arbeiðsumhvørvi,
møguleika fyri at ferðast kring landið,
samskifti uttanlands við viðskiftafólk okkara.

Umsóknarfreist: 11. juni. Løn smb. avtalu.

Tú ert vælkomin at ringja tlf. 11820 og hoyra meira um starvið. Spyr eftir Jan ella Mariu.

Føroya Landsstýri
Undirvísingar- og mentamálastýrið

Skrivari/Málsviðgeri

Starvið:
Almanna- og heilsumálastýrið fyrisitur almannamál, heilsumál, íbúðarmál og arbeiðsmarknaðarmál.

Uppgávur skrivarans verða í høvuðsheitum:
- Vera skrivari hjá stýrinum.
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til skrivaran.
- Málsavgreiðsla.
- Fyrireika arbeiðsuppgávur í stýrinum.
- Skriva fundarfrágreiðingar.
- Aðrar uppgávur.

Førleikakrøv:
Vit hugsa okkum, at tú hevur útbúgving og royndir í skrivstovuyrkinum og góðan kunnleika til edv. Tú ert stinn/stinnur í føroyskum, h vur góð samstarvsevnir, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Tað er ein fyrimunur, at tú hevur HH-, students- ella HF-prógv.

Vit bjóða:
- Almanna- og heilsumálastýrið verður skipað, og verður tú sjálv/sjálvur í ávísan mun við til at mynda starvið.
- Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum í tættum samstarvið við politiskar myndugleikar og stovnar á almanna- og heilsuøkinum.

Setanar- og lønartreytir:
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið og verður lønt í 18/20 lønarflokki.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna.

Umsókn:
Umsókn við prógvum o.a. skal sendast:

Almanna- og heilsumálastýrinum
Postrúm 64
110 Tórshavn

Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. juni 1997.
Starvið verður sett skjótast tilber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Høgna Joensen, almanna- og heilsumálastjóra, á tlf. 11080.